# Tann størsti í søguni

Hóast hann – eins og Roger Fedrer – hevur vunnið 14 Grand Slam-kappingar í tennis, so staðfesti Pete Sampras sunnukvøldið, at Roger Federer er besti spælarin í tennissøguni. – Eg vann ongan tíð í Paris. Tað hevur Federer nú gjørt, so eftir míni meting er hann tann størsti nakrantíð, segði Pete Sampras, tá sigurin hjá Federer var veruleiki. Federer hevur umframt sigurin í gjár vunnið tríggjar Australian Open, fimm Wimbledon og 5 US-Open.



# Federer fyri 14. ferð

Schweiziski Roger Federer vann sunnudagin sína 14. Grand Slam-kapping, tá hann í finaluni í French Open vann 6-1, 7-6, 6-4 á svenska Robin Söderling. French Open var samstundis tann einasta av teimum fýra stóru kappingunum, sum Federer ikki hevði vunnið, og við í alt 14 Grand Slam-sigrum javnaði Federer hartil metið, sum amerikanski Pete Sampras higartil hevur átt.



*A-landsliðsvenjarin, Brian Kerr, helt føroyska U21-landsliðið sýna stórt dirvi, tá tað sjálvt við 10 monnum royndi at leypa á og skapa møguleikar ímóti rumenska liðnum, sum tó var alt ov sterkt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vístu dirvi í minniluta

**A-landsliðsvenjarin, Brian Kerr, var hugtikin av, at føroyska U21-landsliðið vísti dirvi í dystinum ímóti Rumenia, hóast talan var um eitt nógv betri lið og at føroyingarnir síðsta hálva tíman vóru í minniluta**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Millum áskoðararnar á ovara vølli í Gundadali leygarkvøldið var A-landsliðsvenjarin, Brian Kerr, og hann kundi eftir 0-4 ósigurin fyri Rumenia staðfesta, at her var talan um eitt lið, ið var ov sterkt fyri føroyska U21-landsliðið.

– Vit mugu hava í huga, at bæði Rumenia og Russland eru lond, sum hava eina rúgvu av spælarum at velja ímillum, umframt at tey hava stórar fótbóltstraditiónir. Vit skulu ikki vænta okkum, at vit vinna á Rumenia, men vit mugu royna at fáa tað besta burtur úr tí, sum vit hava, segði hann eftir dystin.

– Eg eri eisini vísir í, at dysturin ímóti Russlandi verður eisini ein trupul dystur, so venjararnir mugu royna at byggja liðið upp til tann dystin. Sjálvur eri eg vísur í, at russiska liðið verður líka gott sum hetta rumenska, og hetta eru altso klassalið, sum vit møta her.

## Fleiri dystir

Brian Kerr helt, at fyri at fáa sum mest burtur úr teimum veruligu dystunum, er neyðugt við fleiri venjingardystum, so venjararnir lættari kunnu síggja, hvussu spælararnir verða best brúktir, áðrenn dystir sum hesir eru á skránni.

– Men annars haldi eg, at føroyska liðið vísti dirvi í seinna hálvleiki, tá tað hevði sínar frægastu løtur. Enntá við 10 monnum, eftir at málverjin var vístur út, royndu teir framvegis at leypa á. Prísurin fyri tað var so eisini, at okkurt mál fór inn í hinum endanum, men eg haldi, at teir vístu stórt dirvi, segði A-landsliðsvenjarin, ið helt útvísingina av Trygva Askham vera harða.

– Har var ikki nógv, ið málverjin kundi gera við hasa støðuna, so eg haldi, at hatta var ein harður dómur. Kanska dómarin kundi hugt meira at umstøðunum og latið hann fingið eitt gult kort í staðin.

## Mugu spæla

Annars helt Brian Kerr, at U21-venjararnir hava fleiri møguleikar, nú teir skulu byggja liðið uppaftur til dystin ímóti Russlandi í annaðkvøld.

– Um vit bara hyggja at teimum, ið sita á bonkinum, so eru har fleiri spælarar, ið kunnu geva venjarunum nógv fleiri møguleikar, tí bonkurin er sterkur. Tann stóra avbjóðingin verður, at spælararnir kunnu hava bóltin meira á hálvuni hjá mótstøðuliðnum, tí nú vita vit, at teir duga at skapa møguleikar. Hesa ferð var trýstið bara í størra lagi til tað, helt hann.

– Vit síggja eisini, at fleiri á liðnum hava góðar tekniskar førleikar, men at tað kanska restar í á øðrum økjum. Tú kanst siga, at har eru fleiri sterkir spælarar, sum kanska ikki eru nóg skjótir, samstundis sum har eisini eru fleiri tekniskt góðir spælarar, sum bara ikki eru nóg sterkir. Ber til at finna hesa javnvágina, eru avgjørt møguleikar fyri framman.

Viðvíkjandi menning av ungu spælarunum, heldur Brian Kerr tað altíð vera eitt gott hugskot, at spælarar fara av landinum, har teir kunnu vera fulltíðar yrkisspælarar. Men so krevst eisini, at teir spæla:

– Vit hava alt ov nógv dømi um útisetar, sum hava sáttmálar við feløg, men bara ikki spæla. Tá hevði tað verið frægari, at teir spældu í Vodafonedeildini, enn at teir fóru uttanlands, fyri bara at sita á bonkinum onkrastaðni.

# Eitt stórt skuffilsi

**Málverjin á U21-landsliðnum, Trygvi Askham, var sera skuffaður eftir dystin leygarkvøldið, sum hann bara slapp at spæla ein góðan tíma av, til hann fekk reyða kortið fyri at hava tikið bóltin við hondini uttan fyri egnan brotsteig**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað líktist mest av øllum ein refleksi, tá Trygvi Askham beint uttan fyri egnan brotsteig tók hondina til hjálpar, tá ein av rumenunum royndi at lobba upp um hann. Støðan var íkomin, tí ein sera sjuskut afturlegging noyddi Trygva at koma út ímóti, og so slapst ikki undan reyða kortinum.

– Sjálvur haldi eg, at hetta var eitt stórt skuffilsi. Nú hevði eg glett meg nógv til at sleppa at royna meg á U21-landsliðnum, tí hetta var ein stór gularót at fáa, staðfesti 07 Vesturmálverjin, sum undan útvísingingi hevði gjørt tað, sum hann kundi gera. Og málini kundi hann einki gera við.

– Tað gekk annars fínt, og um alt var, sum tað átti, so skuldi eg nú gingið og glett meg til dystin ímóti Russlandi, men tað verður so av ongum.

Um sjálvan dystin segði Trygvi Askham, at talan var ein eitt mótstøðulig, sum hevði góðar tekniskar førleikar og spældi øgiliga væl.

– Eitt nú brúktu teir nógvar diagonalbóltar, sum sóu út til at kost okkum øgiliga nógv til endans. Fyrst í dystinum leikaði nógv á, men tað var kanska líka frægt, tí so verður tú spældur heitur beinanvegin. Men nú alt er liðugt, eri eg ræðuliga skuffaður, staðfesti Trygvi Askham, sum noyddist undir brúsuna í ótíð og í øllum førum ikki er við ímóti Russlandi í annaðkvøld.



*Talan var um stórt vónbrot hjá Trygva Askham, sum noyddist av vøllinum við reyðum korti eftir góðum tíma leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*